## 14. árgangur av Birting




*Tíðindaskriv*

14 árgangur av Birting er komin og fæst í bókabúðunum.

Innihaldið er stuttsøgur, yrkingar og siðsøguligt tilfar.

Jens Pauli Heinesen, sum júst er farin um tey sjeyti, hevur skrivað stuttsøguna Komið innar, Sólrun Michelsen Angi av deyða, Mina Reinert Summardáin og Frits Johannesen hevur eisini roynt seg sum stuttsøguhøvundur við søguni Manskórið á Ytstu Trom.

Av siðsøguligum tilfari er at nevna áhugaverdu frásøgn hjá Johs. Andr. Næs um Káragjógv, har ið hann sjálvur í barna- og unglingaárunum átti nógv sporini.

Elin Dahl Johannesen hevur skrivað um pápa sín, Dr. Dahl og um viðurskiftini í Sandagerði, har ið tey búðu undir krígnum, tá ið bumbuflogfør og minur vóru ein støðug hóttan.

Ebba Skaalum greiðir frá eftirkomarunum hjá ommu síni Charlottu Danielsen úr Porkeri, sum doyði frá 10 børnum í 1904.

Suni F. Jacobsen hevur týtt eitt brot út bókini hjá Gretu Gravesen, læknakona í Føroyum í 5 ár. Sera hugatakandi greiðir hon frá fyrstu jólunum eftir at tey koma til Sands at starvast seinast í 20-unum.

Hóri og Robert McBirnie hava hvørt hvør sína yrking í blaðnum.

Myndirnar í Birging hava Elisabeth Pike, Gyðja H. Didriksen og Frits Johannesen gjørt.

Permumyndina hevur Eyðun av Reyni málað.

Birting 2002 er 64 blaðsíður og kostar í bókabúðunum 80 kr.

Ritstjóri er Niels Nattestad.

## Lesiætlan til Bíbliuna

ÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Í hesum døgum gevur Forlagið Rhema út Bíbil – Lesiætlanina av nýggjum. Hetta er uppaftur prent. Hon varð givin út fyrru ferð í fjør í 2000 eintøkum. Lesiætlanin verður eisini í ár prentað í 2000 eintøkum.

Bóklingurin er á 16 síður. Skipa fyri útgávuni hevur Fríðtór Debes, meðan Hestprent hevur staðið fyri prentingini. Permina hevur Britt Rasmussen gjørt. Petur Kirke hevur eisini hjálpt til við útgávuni. Tann, ið upprunaliga gjørdi lesiætlanina æt R.M. Mc Cheyne.

Bóklingurin kostar 20 krónur. Hann fæst í flest øllum bókhandlum. Higartil eru seld uml. 1700 eintøk. Serliga eru tað samkomur, ið hava gjørt nýtslu av Lesiætlanini og deilt hana út til ymsu limirnar í byrjanini av nýggja árinum.

Við at nýta Lesiætlanina kanst tú lesa gjøgnum alla Bíbliuna eftir einum ári. Tú kemur ígjøgnum Nýggja Testamenti og sálmarnar 2 ferðir um árið. Aftast í heftinum finnur tú m.a. Frelsunar ABC; Orð til hin trúgvandi; Hvar finni eg kend skriftstøð; Týðandi støð í Bíbliuni.

Sum nakað nýtt er tikið við í hesari útgávuni kenda Bøn Jabezar og sum tú kanst gera til ein part av tínum dagliga bønarlívi.

# Vágatunnilin vil hava 6.000 kr. av mánaðarlønini áðrenn skatt, men hvør vil gjalda???

*Jan Johannesen*

Stórbrúkarnir av sambandinum um Vestmannasund eru stóru taparnir í nýggju prísskipanini, sum P/F Vágatunnilin hevur kunngjørt. Millum stórbrúkarnar finnast vinnulívskundar, Strandferðslan og pendlarar við persónbili. Í hesi grein verður støðan hjá pendlarum við persónbili viðgjørd.

Vit eru nógvir pendlarar við bili standandi mánadag-fríggjadag annaðhvørt við ferjuleguna í Vestmanna ella á Oyragjógv. Flestu okkara sóu fram til at brúka undirsjóvartunnilin til og frá arbeiði hvønn dag. Men við teimum prísum sum nú eru komnir á borðið er lítil hugsingur um tann møguleika. Eitt 20 túra avsláttarkort, ið røkkur næstan ein mánað, kostar 3.000 kr. Siga vit at ein mánaði um árið er feriu, so skal ein av hesum bilførarum gjalda í minsta lagi 33.000 kr um árið. Yvir tey 15 árini sum gjaldið verður innkravt, kemur undirsjóartunnilin at krevja uml. eina _ millión inn, ella sagt ørvísi, viðkomandi skal gjalda 1.000.000 kr av bruttolønini til Vágatunnilin.

Men eg vænti at teir koma at bíða leingi eftir hasari hálvu milliónini. Fáir pendlarar kunnu vænast at taka av hesum tilboðið.

Í dag er støðan soleiðis, at teir persónbilar, sum ferðast dagliga aftur og fram við Ternuni hvønn dag kunnu teljast á einari hond, ella í mesta lagi teimum. Hesin kundabólkur er í høvuðsheitum samansettur av stjórum og fólkið, har arbeiðsgevarin betalur ferðakostnaðin. Hesin bólkur kann væntast at halda fram at ferðast hvønn dag við teimum nýggju prísunum.

Hin bólkurin (week-end bilar) sum bert ferðast við Ternuni mánamorgun og fríggjakvøld brúkar sum nú er 10 túra-kort, sum fyri hvønn einvegis túr kostar 68 kr. Mánaðarliga fær Ternan uml. 550 kr. frá hesum kundum. Sjálvt við 10 túrakortið ferðast hesin bólkur ikki dagliga, tí prísurin er ov høgur. Orsøkin til at prísurin er so høgur hevur helst samband við avmarkaða kapasitetin við ferjuni.

"Week-end bilarnir" vilja heldur ikki fara at ferðast hvønn dag aftur og fram, tí mánaðargjaldið sum áður nevnd verður omanfyri 3.000 kr. Ístaðin kann væntast at teir fara at ferðast sum higartil, um ikki ein partur gevst at koyra. Vágatunnilin vil fáa uml. 600 kr um mánaðan frá hvørjum av hesum bilum. Talið 600 stavar frá einum persónbili, sum keypir sær eitt 20-túra kort t/r frá Vágatunnlinum og brúkar 4 klipp um mánaðan.

Tað man ikki vera langt av leið at siga, at í dag eru einir 30 "week-end bilar." Fara hesir at ferðast sum higartil og einir 5 bilar fara at ferðast dagliga um sundið, so fær Vágatunnilin umleið 33.000 um mánaðan frá hesum kundum. (Sí talvuna:alternativ 1).

Men um nú Vágatunnilin kemur út við einum mánaðarkortið fyri 1.500 kr, so meti eg at í minsta lagi 2/3 av teimum 30 bilunum fara at brúka mánaðarkort fyri bil. Teir 5 føstu kundarnir vilja eisini fáa hendan prísin. Hin 1/3 vil ferðast sum higartil. Harafturat kann roknast við einum vøkstri í tali av pendlarum við persónbili, um mánaðarligi prísurin er 1.500 kr. Hann havi eg sett til 25 % í alternativ 2. Á Oyrasundsbrúnni er talið av pendlarum við persónbili vaksið við 500 % eftir tveimum árum, samstundis sum prísurin er niðursettur úr 3.400 kr til 2.400 kr fyri eitt mánaðarkort. Prísurin á tí brúnni er politiskt ásettur fyri at verja ferjusambandi millum Helsingør og Helsingborg, tí kundi tað møguliga veri búskaparliga skilagott at fari enn longur niður við prísinum fyri pendlarar, um politisku myndugleikarnir góðu loyvi til tað. Samanlagt gevur alternativ 2 Vágatunnlinum uml. 57.000 kr um mánaðan, ella út við tveir ferðir so nógv sum alternativ 1. Sjálv um talið av pendlarum undir alternativ 1 verður broytt til 10 samstundis sum økingin í ferðsluni í alternativ 2 verður sett niður til at vaksa við 12,5 %, so hevur alternativið við mánaðarkortinum betri lønsemi. Minnast skal eisini til, at Vágatunnilin ikki hevur nakað aktuelt kapasitetsproblem.

Eitt triðja alternativ kann uppsetast við einum mánaðarkorti fyri 1000 kr. Tá kann roknast við at allir teir 30 "week-end bilarnir" fara at brúka mánaðarkort. Harafturat meti eg at í minsta lagið 50 % fleiri bilar fara at gerast pendlarar við hesum prísi eftir 1-2 árum. Eisini hetta alternativ (alternativ 3) hevur betri lønsemi enn alternativ 1.

Men um Vágatunnilin roknar við at fleiri fara at pendla saman tvey og tvey við bili, so krevst at uml. 2/3 av "week-end bilunum leggja um at ferðast saman 2 og 2 við núverandi prísskipan, um alternativ 1 skal byrja at líkjast alternativ 2. Sí alternativ 4. Tað meti eg er lítið sannlíkt, heldur er meiri sannlíkt at fleiri bilførarar við "week-end bilum" leggja um til bara at ferðast við bygdaleiðum. Men vit eru nøkur sum eru noydd at brúka bil ein part av leiðini. Men hvar bilarnir skulu parkerast er ilt at siga??? Hevur P/F Vágatunnilin nakað boð um tað???

Mín niðurstøðu er, at P/F Vágatunnilin hevur uppbygt sína prísskipan við støðið í kostnaðarsíðuni, uttan at seta seg inn í marknaðarsíðuna. At brúka eitt spurnarblað frá 1999 sum grundarlag er burtur úr vón og viti. Sjálvandi søgdu nógv tá, at prísurin ikki hevði so stóran týdning, tí tá longdist fólk einans eftir at fáa sett gongd á fasta sambandið um Vestmannasund. Ein áseting av príspolitikki um Vestmannasund uttan at meta um og kannað kundabólkar, orsøkir til hví fólk ferðast, prísfølsemi og hvørjir aðrir faktorar hava týdning fyri eftirspurningin hjá teimum ymisku kundabólkarnar er óseriøs. Og síst men ikki minst konsekvensútrokningar fyri teir ymisku kundabólkarnar eiga at gerast við grundarlagi í nevndu marknaðarkanningum.

**Konsekvensútrokning fyri persónbilar um Vestmannasund**

| | Mánaðarliga pr. Persón | Nøgd | Tilsamans pr. mðr | Tilsamans pr. ár | Tilsamans yvir 15 ár |
|---|---|---|---|---|---|
| | kr. | tal | kr. | kr. (11 mðr) | kr. |
| Ferðast hvønn dag við bili | 3.000,00 | 5 | 15.000,00 | 165.000,00 | 2.475.000,00 |
| "Week-end bilar" | 600,00 | 30 | 18.000,00 | 198.000,00 | 2.970.000,00 |
| Nýggir kundar | - | 0 | - | - | - |
| **Alternativ 1** | | **35** | **33.000,00** | **363.000,00** | **5.445.000,00** |
| "Mánaðarkort" | 1.500,00 | 25 | 37.500,00 | 412.500,00 | 6.187.500,00 |
| "Week-end bilar" | 600,00 | 10 | 6.000,00 | 66.000,00 | 990.000,00 |
| Nýggir kundar (+ 25 %) | 1.500,00 | 9 | 13.500,00 | 148.500,00 | 2.227.500,00 |
| **Alternativ 2** | | **44** | **57.000,00** | **627.000,00** | **9.405.000,00** |
| "mánaðarkort" | 1.000,00 | 35 | 35.000,00 | 385.000,00 | 5.775.000,00 |
| "Week-end bilar" | 600,00 | 0 | - | - | - |
| Nýggir kundar (+ 50 %) | 1.000,00 | 18 | 18.000,00 | 198.000,00 | 2.970.000,00 |
| **Alternativ 3** | | **53** | **53.000,00** | **583.000,00** | **8.745.000,00** |
| Ferðast hvønn dag við bili 1) | 3.000,00 | 15 | 45.000,00 | 495.000,00 | 7.425.000,00 |
| "Week-end bilar" | 600,00 | 10 | 6.000,00 | 66.000,00 | 990.000,00 |
| Nýggir kundar | - | 0 | - | - | - |
| **Alternativ 4** | | **25** | **51.000,00** | **561.000,00** | **8.415.000,00** |

1) Tveir og tveir persónar við "week-end bil1" velja at ferðast saman dagliga. Harafturat koma teir 5 sum vóru í alternativ 1.

# Vikuskifti

Nr. 226 • leygardagur • 23. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Perestroika er enn komandi

Eini 2000 fólk hoyrdu fyrilestur eftir Mikhail Gorbatjov, fyrrverandi leiðara Russlands, á Harvard i USA í farnu viku. Bartal Nolsøe Poulsen, sum er lesandi har, var millum áhoyrararnar.



Lesið síðu 8 & 9



*Poul á Skalla við installeringinum, sum júst er blivin liðugur og sum hevur fingið navnið Fiskaklettur. Tað tekur minst eitt hálvt ár at gera ein bát sum hendan*

# Tað riggar ikki at sita fyri onki

ÍTRIV
*Áki Bertholdsen*

Tað riggar ikki at sita fyri onki. Í hvussu so er ikki hjá Poul Emil Poulsen í Hvalba. Tá ið so Poul á Skalla, sum hann vanliga verður nevndur, bleiv óarbeiðsførur, vóru góð ráð dýr. Men ístaðin fyri at fella í fátt, tá ið teppið brádliga varð rykt undan honum, fór hann at arbeiða í hondunum, tí hann ikki kundi arbeiða so nógv við kroppinum.

Og úrslitið av tí prýðir nú ikki bara fleiri rúm í hansara egnu húsum, men eisini fleiri aðrar stovur, bæði herheima og uttanlands.

Poul á Skalla var sjómaður í nógv ár og sigldi við føroyskum og norskum trolara. Men ein dagin í 1974, meiðslaði hann seg so illa umborð, at hann bleiv óarbeiðsførur og mátti halda uppat at sigla. Hann meiðslaði tríggjar geislar í rygginum og kom ongantíð fyri seg aftur, hóast hann varð lagdur undir skurð.

Tá ið hann nú var komin at sita fyri onki, fekk hann tað hugskot at fara at gera borðbátar og ymsan reiðskap í lítlari stødd burturúr viði og messingi.

Hetta er eitt ítriv, hann tók upp eftir pápan, sum eisini fekst eitt sindur við slíkt.

– Eg mátti hava okkurt at pjakast við, tí eg trívist ikki at ganga fyri onki

– Tá ið eg sá meg føran fyri tí, fór eg niður á verkstaðið ímeðan pápin var til arbeiðis og helt fram við tí, hann var í holt við. Tá ið hann kom aftur, rættaði hann uppá meg, soleiðis lærdi eg kynstrið at fáast við slíkt, sigur hann

Síðani hevur hann gjørt fleiri borðbátar, bæði sluppir og installeringar, umframt ein hóp av grindareiðskapi, fiskireiðskapi, reiðskapi til fugl, alt í so smáari stødd, at tað skal varsemi til at taka tað ímillum fingrarnar. Tá ið tað er liðugt, verður tað sett í rammu at hongja upp á eitt bróst.

### Minst eitt hálvt ár

Tað, sum mest arbeiði er av, eru borðbátarnir.

Hann hevur gjørt borðbátar til abbasynirnar, men tað er eisini ein ávísur áhugi at keypa borðbátar, hann hevur gjørt og hann hevur selt, bæði norðureftir og uttanlands.

Treyðugt so, onkran lut hevur hann eisini latið til vinningar í spæli og hann hevur eisini havt bátar hjá sær við á framsýningum hjá "Hendur og Hugflog".

– Tað ganga nógvir tímar til ein slíkan bát, men hann hevur ongantíð talt.

– Men tað tekur minst eitt hálvt ár at gera ein slíkan bát, minni ger tað ikki hjá mær, sigur hann.

Viðurin, hann brúkar, er sambaviður, sum ongin kvistur er í. Tað er viðhvørt nakað longi at bíða eftir viðinum, men hann er avbera góður, bara hann verður hitaður eitt sindur, kann hann boyggjast sum ein vil.

Tað hevur ikki altíð verið so nógv ferð á "bátasmíðinum" hjá honum. Fyri trimum árum síðani varð hann fyrst skorin fyri krabbamein og beint eftir skifti hann knæið.

– Tvær stórar skuðviðgerðir upp á stutta tíð fóru við øllum kreftum, men síðani gekk framá aftur.

Amboðini eru góð og tey hevur hann keypt so við og við, so hvørt, sum ráðini eru til tað.

Men ein maskina, sum høvlar og sagar, og sum hann ynskti sær, kostaði næstan 8.000 krónur og hana bað hann Almannastovuna hjálpa sær við at keypa. Men tað læt seg ikki gera, tí tey søgdu, at hann var ov gamalur.

– Men eg fekk eina avbera lagaliga avtalu við Valdemar Lützen, sum seldi maskinuna, so tað eydnaðist at fáa maskinuna kortini. Og tað var eitt gott og hent keyp.

Installeringurin, sum hann akkurát er liðugur at gera, er 1,20 metrar langur og hevur motor við fjarstýring. Motorurin er viskaramotorurin úr einum bili, sum hann hevur sett í bátin.

Hann hevur verið og siglt við honum og hann ber seg sera væl á sjónum og fjarstýringin rakk einar 200 metrar.

Og hóast Poul á Skalla nú er 72 ára gamalur, hevur hann ongar ætlanir um at gevast.

Hann er við at forma skrokkin til eina slupp. Somuleiðis hevur hann merkt ein installering upp, sum verður 1,30 metrar langur, hann heldur, at stórt størri ber ikki til at gera teir.

Men hetta skal hann so hava at fáa tíðina at ganga við í vetur og nakað afturat.

Borðbátin, sum hann nú hevur gjørt, ætlar hann eisini at selja. Men skuldi hann tikið sær tímaløn fyri arbeiðið, hevði ongin keyp hann.

– Fái eg 10.000 krónur fyri hann, eri eg nøgdur.

Men minni enn tað heldur hann ikki, at tað kann vera, tí bara fjarstýringin, ljósini, og annað, sum báturin er útgjørdur við, kosta 5.000 krónur.

Umframt hetta ítrivið, hevur Poul á Skalla eisini nakrar seyðir, so tað gongur......